SKYN

# Ikki bert ognir, men heim



## NES, TOFTIR

Sethús, Gaddavegur 35

269 584 2 2006

Nýggj og hugnalig hús við avbera góðum útsýni. Húsini eru í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er hjallur, gongd, vesi, brúggers, køkur, stova, tvey kømur og baðirúm. Í niðaru hæddini er kjallari, sum er skildraður sundur. Køkurin er HTH-køkur og sera arbeiðsvinaligur. Inn frá hjúnarúminum er eitt snotiligt baðirúm við brúsu og baðikari. Bilhús hoyrir eisini til ognina. Húsini standa væl fyri í barnavinaligum umhvørvi, og stutt er til barnagarð og skúla.

Prísuppskot: kr. 1.750.000








SENDISTOVAN

## STREYMNES

Sethús, Neystavegur 17



158 950 3 1948




Húsini eru í trimum hæddum. Í miðhæddini er hjallur, durur, gongd, baðirúm, køkur og stova. Á loftinum er gongd, vesi og fýra kømur. Í niðastu hæddini er kjallararúm. Harafturat er bilhús og seyðahús. Húsini eru frá 1948, men øll miðhæddin varð gjørd av nýggjum í 2008. Húsini standa væl fyri í Streymnesi, stutt frá skúla og barnagarði.

Prísuppskot: kr. 950.000

## TÓRSHAVN

Raðhús, Varðabyrgi 8



127 134 3 1989




Raðhús stutt frá miðbýnum. Í ovaru hæddini er gongd, køkur, stova og kamar. Í niðaru hæddini er durur, gongd, brúggers, baðirúm og trý kømur. Eisini er ovastaloft. Har er tætt tróður og bjálvað niður á gólvið. Parkeringspláss er til ein bil umframt felagsparkering. Húsini standa væl fyri í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi tætt við ítróttaøki, ítróttahallir og svimjihøll, og stutt er oman í býin.

Prísuppskot: kr. 1.750.000